Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 45 - 5. mars 2010

## Eiga at gjalda alt

45 prosent av danska fólkinum halda, at íslendingar eiga at endurrinda bretum og niðurlendingum alla Icesave-skuldina. Fyrr hava tilsvarandi meiningakanningar í Noregi og Svøríki víst, at har halda ávikavist 33 og 21 prosent, at íslendingar skulu rinda alt. Men tá fólk vórðu spurd um renturnar ella kostnaðin av skuldini, var støðan ein onnur. Í Danmark halda 30 prosent, at tey trý londini skulu býta kostnaðin javnt sínamillum, tað sama siga 45 prosent í Noregi og heili 53 prosent av teimum spurdu í Svøríki.




## Orka gevur arbeiðspláss

Ein nýggj verkætlan, sum hevur fingið heitið Energi på havet, skal útvega umleið 7.000 nýggj arbeiðspláss í Esbjerg tey næstu tíggju árini. Offshore Center Danmark, sum heldur til í Esbjerg, stendur aftan fyri ætlanina saman við umleið 40 fyritøkum, ymsum myndugleikum og nøkrum útbúgvingarstovnum. Orsøkin til átakið er, at oljuvirksemið í Norðsjónum er minkandi, og tað sæst aftur í Esbjerg, sum er høvuðsbýur hjá donsku frálandavinnuni. Eitt nú missa 400 fólk arbeiðið, tí at Mærsk Olie & Gas tekur tveir av sínum pallum úr framleiðslu, skrivar DR.

# Her kundi endað galið

**Innbygd spottljós, sum sett vórðu upp fyri nøkrum árum síðan, og ikki eru í boks, kunnu vera orsøk til, at eldur kemur í hús**

EL-INNLEGGINGAR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Hvussu kunnu fólk vita, at vandin lúrar uppi yvir slíkum spottljósi?*



*Leidningarnir vóru fullkomiliga smeltaðir av hitanum frá lampunum*



*Viðurin rundan um lampustøðini var eisini merktur av ov nógvum hita*

Í fleiri ár hevur verið nógv brúkt at seta spottljós upp í loftið, og slík ljós vóru eisini í húsunum, sum ein familja í Havn keypti fyri nøkrum árum síðan.

Nú ein dagin slóknaðu óvanliga nógvar perur, og tá ið tey pilkaðu eina av lampunum niður, datt ymist dust niður undan lampustaðnum. Tað var eyðsæð, at har var nakað brunnið, og familjan skundaði sær at ringja eftir einum elektrikara.

Elektrikarin Heini Magnussen var skelkaður, tá ið hann sá skilið.

- Tað kundi tað sama verið komin eldur í húsini, segði hann.

Heini Magnussen tók so øll spottljósini niður, og hann sá, hvat var galið, og hetta hevði hann sæð aðrastaðni eisini:

Ljósini vóru sett beint upp í loftið í træ og við ongum kassa uttanum perurnar, sum tað vanliga er nú.

Heini Magnussen veit um fleiri hús aðrastaðni, sum eru brunnin í grund av somu orsøk.

### Brendaroykur

Í húsunum, sum Heini Magnussen var í, vóru leidningarnir brunnir heilt upp av hitanum, og viðurin, har lampurnar høvdu sitið, var svartur av hita. Brendaroykur merktist.

Releið brýtur ikki frá, um eldur kemur í spottljósini, tí eingin jørðleidningur er til hesar lampur.

Heini Magnussen veit, at í fleiri húsum vórðu spottljós sett upp upp á henda mátan, og tað gekk, til SEV herdi eftirlitið, og nýggj reglugerð kom. SEV góðkennir allar innleggingar í nýggjum húsum.

Nú skulu spott, sum verða bygd upp undir loftið, vera í kassum ella í dósum, ið isolera. Hetta vita allir elektrikarar. Tey óvardu spottljósini fáast framvegis, men Heini Magnussen ivast í, um nakar innleggjari við síni fullu fimm, fær seg til at seta tey upp.

- Tað er lívsetandi vandamikið, sigur hann.

Men tað kann vera, at fólk sjálv gera tað, og tá varnast SEV tað ikki, tí SEV góðkennir bara innleggingar í nýggjum húsum.

Heini Magnussen veit eisini, at fólk, sum keypa gomul hús og seta tey í stand, ofta vilja hava spottljós bygd upp í loftið. Ofta er trupulleikin, at loftið er ov lágt.

- Í slíkum føri sigi eg nei til at seta spottljósini upp, sigur Heini Magnussen.

### SEV ansar eftir

Dánial Jógvan Hansson, eftirlitsleiðari hjá SEV sigur, at tá ið SEV skal góðkenna eina innlegging, verður hugt serliga væl at innbygdum spottljósum, og eftirlitsfólkini gera stundum stakroyndir við at taka ljós niður fyri at vita, at ljósini eru sett upp eftir reglunum. Tey góðkendu ljósini hava aluminiusmreflektor, sum kastar hitan fram, og hitin fer ikki uppeftir. Ljósini eru góðkend til ávísa perustyrki, og tað er sera umráðandi ikki at brúka sterkari perur, tí spottini kunnu hervið gerast ov heit.

Alt hetta eigur elektrikarin at vegleiða fólk um, tá ið hann setir ljós upp.

Ansað eigur eisini at vera eftir, hvat tilfarið er, sum amaturið verður sett á, tí tað má ikki sita á brennbarum tilfari.

Familjan, sum fekk hvøkkin av brunnu spottljósunum hevur skift øll tey vandamiklu ljósini út. Skelkurin er ikki farin enn. Børnini sova á loftinum, og ljósini sótu í gongsloftinum og í loftunum yvir trappuni. Hvat kundi ikki verið hent, um eldur kom í?